**SUNSET KAPPINGIN**

KVINNUR

| | dystir | v - j - t | vu. mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VB | 1 | 1 - 0 - 0 | 477 | 295 | 182 | 15 |
| 2 Stjørnan | 1 | 1 - 0 - 0 | 385 | 290 | 95 | 15 |
| 3 Neistin | 1 | 0 - 0 - 1 | 420 | 337 | 83 | 10 |
| 4 Søljan | 1 | 1 - 0 - 0 | 407 | 347 | 60 | 10 |
| 5 VÍF | 1 | 0 - 0 - 1 | 350 | 351 | -1 | 5 |
| 6 StÍF | 1 | 0 - 0 - 1 | 340 | 401 | -61 | 5 |
| 7 Kyndil | 0 | 0 - 0 - 0 | 269 | 392 | -123 | 3 |
| 8 Tjaldur | 0 | 0 - 0 - 0 | 221 | 456 | -235 | 0 |

**ATLANTIC AIRWAYS KAPPINGIN**

MENN

| | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 VÍF | 4 | 3 - 0 - 1 | 419 | 378 | 41 | 14 |
| 2 Kyndil | 4 | 2 - 0 - 2 | 417 | 340 | 77 | 12 |
| 3 KÍF | 4 | 2 - 1 - 1 | 356 | 381 | -25 | 9 |
| 4 StÍF | 4 | 2 - 2 - 0 | 373 | 401 | -28 | 9 |
| 5 H71 | 4 | 1 - 0 - 3 | 411 | 419 | -8 | 7 |
| 6 Neistin | 4 | 0 - 1 - 3 | 384 | 441 | -57 | 4 |

## Máltindarnir

**Kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| Nicoleta Radu Hansen | Søljan | 121 (15) |
| Ioana Rápa | VÍF | 98 (25) |
| Daiva Tuomaite | VB | 84 (28) |
| Simona Petersen | Neistin | 82 (15) |
| Randi Wardum | Kyndil | 66 (14) |
| Lina Andriulyte | Søljan | 65 (7) |
| Aukse Vysniaskaite | VB | 59 (3) |
| Sunfríð B. Jacobsen | StÍF | 56 (23) |
| Rebekka Justinussen | StÍF | 53 (9) |
| Heidi Maria Akselsen | Søljan | 51 |
| Marjun Tróndarson | Neistin | 49 (7) |
| Rannvá Augustinussen | VB | 48 (1) |
| Vesna Tomajek | Tjaldur | 46 (21) |
| Poula D. Olsen | StÍF | 45 |
| Ása Dam á Neystabø | Neistin | 44 (2) |

**Menn**

| | | |
|---|---|---|
| Ingi Olsen | VÍF | 77 (21) |
| Agnar Joensen | VÍF | 62 (2) |
| Halgir D. Olesen | H71 | 62 (4) |
| Sveinur Justinussen | StÍF | 62 (7) |
| Damir Oros | Neistin | 60 (12) |
| Áki Mørk | Neistin | 58 (7) |
| Josef Abrahamsen | Kyndil | 56 (12) |
| Piti Negru | H71 | 55 (4) |
| Henrik Gerster | H71 | 53 (6) |
| Høgni Klein | Kyndil | 49 (2) |
| Leivur Justinussen | StÍF | 48 (8) |
| Jakob Jónsson | Kyndil | 47 (1) |
| Regin Petersen | KÍF | 47 (4) |
| Alexandur Johansen | StÍF | 39 (13) |
| Hans Áki Dal-Christiansen | Kyndil | 36 (6) |

Stjørnan-StÍF 38-25(16-14)

# Avgreiðsla hjá Stjørnuni

**Stjørnan gjørdi tað, ið neyðugt var, tá ið StÍF vitjaði í Klaksvík sunnudagin. Eftir ein heldur ivasaman fyrra hálvleik tóku klaksvíkskvinnur sær um reiggj eftir steðgin og settu ferð á**

SUNSET-KAPPINGIN

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Í seinna hálvleiki tók Stjørnan sær um reiggj og syrgdi fyri einum tryggum sigri á StÍF*

*Mynd: Bárður Lydersen*

Tað var eitt sindur av einum anti-klimaksi hjá Stjørnuni, tá ið tær sunnudagin fingu vitjan av strandakvinnum í Klaksvík. Tvær tær seinastu ferðirnar, at Stjørnan er farin á vøllin, og báðar ferðirnar hevur tað verið í KÍ-høllini, hevur tað verið til sera týðandi dyst móti arvafíggindunum úr VB. Sunnudagin var tað tó gerandisdagur, tá ið StÍF, sum liggur undir miðjuni í Sunset-kappingini, vitjaði.

### Hugsaðu um finaluna

Tað var nógv, sum bendi á, at tankarnir hjá Stjørnuleikarunum longu vóru farnir at snúgva seg um steypafinaluna komandi leygardag. Undir øllum umstøðum tóktust leikararnir á heimaliðnum ikki serliga fokuseraðir upp á uppgávuna á vøllinum sunnudagin, og serliga var tað í verjupartinum, at lítið skil var á hjá heimaliðnum.

StÍF fekk óvanliga gott pláss frá verjuni hjá klaksvíkskvinnum, og hetta gjørdi serliga Rebekka Justinussen sær dælt av. Hetta førdi við sær, at Stjørnan ongantíð megnaði at fara nakað serligt frá StÍF í fyrra hálvleiki, og tí var tað óivað eisini nøkur borgarlig orð, sum venjarin hjá Stjørnuni, Rógvi Nielsen, segði við sínar leikarar í hálvleikssteðginum, tí í seinna hálvleiki var heimaliðið hamskift.

Eftir einans at hava verið á odda við tveimum málum, 16-14, í hálvleikinum, setti Stjørnan ferð á beinan vegin í seinna hálvleiki, og tað gekk ikki long tíð, so høvdu tær avgjørt dystin. Málini skoluðu inn hjá StÍF, og neyðars Adela í málinum hjá strandakvinnum hevði úr at gera við at heinta bóltin úr meskunum. Hinvegin kann tað tó staðfestast, at verjuspælið hjá Stjørnuni ikki var nøktandi, tí tað er ov nógv hjá oddaliðnum, at eitt av aftaru liðunum í deildini skorar heili 25 mál móti teimum, hugsar Rógvi Nielsen óivað, og tað gevur kanska okkurt at hugsa um undan steypafinaluni leygardagin.

**Stjørnan-StÍF 38-25(16-14)**

**Stjørnan:** Katarina Stjepanov 8, Bára Skaale Klakstein 7, Annika Ljósstein 6(4), Una Olsen 5, Alina Olaru 5, Anna Kristina Samson 4, Joan Midjord Djordjevic 3

**StÍF:** Rebekka Justinussen 10, Súnfríð B. Jacobsen 6(4), Poula D. Olsen 5, Signhild Petersen 2, Malan Petersen 1, Paula S. Høgnesen 1

**Brotskøst:** Stjørnan 5(4), StÍF 4(4)

**Útvísingar:** Stjørnan 1, StÍF 1

**Dómarar:** Eyðun Samuelsen og Andreas F. Hansen

# Eyðun og Andreas døma mansfinaluna

**Nú er greitt, hvørjir dómararnir verða í báðum steypafinalunum í hondbólti, sum verða leiktar í Havn komandi leygardag**

DÓMARAÁSETING

*Terji Nielsen*
*terji@sosialurin.fo*



*Tað verða teir báðir, Andreas F. Hansen og Eyðun Samuelsen, ið skulu døma steypafinaluna hjá monnum komandi leygardag*

*Mynd: Bárður Lydersen*

Nú avgjørt er, hvørji lið skulu hittast í finalunum báðum í Coca-Cola kappingini í hondbólti, hevur Hondbóltsamband Føroya gjørt, hvør ið skal døma finalurnar báðar.

### Brøðurnir døma kvinnufinaluna

Tað verða teir báðir Eyðun Samuelsen og Andreas F. Hansen, sum skulu døma mansfinaluna millum VÍF og StÍF. Teir báðir eru óivað eitt tað besta dómaraparið í landinum, og sannførandi avrikini hjá teimum í hesum kappingarárinum hava óivað gjørt sítt til, at tað eru júst teir, ið hava fingið heiðurin av at døma mansfinaluna.

Finaluna hjá kvinnunum millum Neistan og Stjørnuna fara brøðurnir Hannis og Uni Wardum at døma. Teir báðir eru royndir dómarar, og í fjør høvdu teir heiðurin av at døma mansfinaluna, sum tá stóð millum StÍF og H71.

Sum áðurnevnt verða steypafinalurnar í hondbólti spældar komandi leygardag 5. februar í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn.

Sosialurin
www.sosialurin.fo